# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20



*Øssur Hansen er ein av teimum, sum spælir í heimligu kappingini og á landsliðnum. Hann umboðar nú B68*

# Tíggju útisetar og átta heimamenn

***Landsliðið:****Heðin á Lakjuni er ikki úttikin til landsliðsferðina. Allir útisetarnir uttan skaddi Hans Fróði Hansen og Pól Thorsteinsson, sum er leikbannaður í trimum undankappingardystum, fara við landsliðnum til Liktinstein*

JÓANNES HANSEN

Allan Simonsen var sunnudagin á Svangaskarði og hugdi at B68 og B36. Seks spælarar, sum vóru við á venjingarleguni í La Manga, vóru á vøllinum, men landsliðsvenjarin gjørdist neyvan nógv klókari av tí, sum hann sá.

Venjarin fór aftur til Danmarkar í fyrradagin, og í gjár fekk umsitingin hjá FSF nøvnini á teimum átjan, sum í aðru viku skulu við niður til Liktinstein.

Allir teir seks, sum sunnudagin spældu á Svangaskarði, fáa landsliðsboð í hesum umfarinum. Vit kunnu ímynda okkum, at stríðið um síðsta plássið í álopinum hevur staðið millum Jákup á Borg úr B36 og Heðin á Lakjuni úr KÍ. Sunnudagin skoraði Heðin tvær ferðir í Sumba. Hann hevur verið væl fyri í undanfarnu steypadystunum, og tí man tað ivaleyst kennast sum eitt lítið vónbrot fyri hann, at Allan Simonsen ikki vísti honum álit hesa ferð.

Umframt teir seks, sum spældu á Svangaskarði sunnudagin, eru bara tveir aðrir úr heimligu kappingini úttiknir til vinardystin í aðru viku. Teir eru Rógvi Jacobsen úr KÍ og Jóhannes Joensen úr HB.

**Útisetarnir væl mannaðir**

So at siga allir útisetarnir eru tøkir á ferðini til Liktinstein. Annað undantakið er Hans Fróði Hansen, sum aftur hevur brotið óstbeinið. Í gjár varð avgjørt, at hann skal koma til Føroya at fáa læknahjálp. Hitt undantakið er Pól Thorsteinsson, sum júst er fluttur til Vál í Íslandi. Tey trý leikbannini í HM undankappingini gera, at venjarin ikki roknar við honum fyribils.

Merkisvert er tað, at hesa ferð eru tíggju spælarar úr feløgum í Íslandi, Noreg og Danmark á landsliðnum. Hetta er fyrsta ferðin, at heimligu spælararnir eru í minniluta, men hetta er neyvan síðsta ferðin.

Teir átjan spælararnir, sum skulu til Liktinstein, eru Jens Martin Knudsen, Leiftur og Jákup Mikkelsen, Herfølge, sum eru málverjar, og Óli Johannesen, AGF, Jan Dam, B68, Jens Kristian Hansen, B36, Jóhannis Joensen, HB, Fróði Benjaminsen, B68, Allan Mørkøre, ÍBV, Henning Jarnskor, Válur, Øssur Hansen, B68, Julian Johnsson, Sogndal, Sámal Joensen, Leiftur, Rógvi Jacobsen, KÍ, John Petersen, B36, Uni Arge, ÍA, Kurt Mørkøre, Sogndal, Heðin á Lakjuni, KÍ og Todi Jónsson, FCK.

Landsliðið fer úr Føroyum flaggdagin, sum er týsdagin eftir páskir, dysturin verður spældur mikukvøldið 26. apríl, og hósdagin 27. apríl skulu spælararnir vera aftur í Føroyum, Danmark, Noregi og Íslandi.

# Eru ikki í venjing

***Danmark:*** *Annar av nýggju venjarunum hjá Óla Johannesen helt mánakvøldið eftir sigurin á Vejle, at venjingarstøðan hjá fleiri av spælarunum er ikki nóg góð*

Í fyrsta umfari hjálpti tað ikki um støðuna hjá Óla Johannesen í AGF, at felagið hevur givið venjaranum, Peter Rudbæk, sekkin, og at Kent Nielsen og Lars Lundquist í vikuskiftinum fyribils tóku ábyrgdina á seg.

Onkrar broytingar vórðu gjørdar undan botndystinum í Århus mánakvøldið, men Óli Johannesen er framvegis ikki í superliguni.

Og eftir lokið stríð gav annar av nýggju venjarunum fleiri av spælarunum ein orduligan vals, sum ikki kann skiljast annað enn ein ábreiðsla á avhildna venjaran, sum varð uppsagdur leygardagin:

– Fleiri av spælarunum vóru deyðamóðir fram móti dystarenda. Teir tóktust ikki at vera í nóg góðari venjing at standa seg í 90 minuttir. At fáa skil á hesum er tað fyrsta, sum vit mugu arbeiða við, segði Lars Lundquist, sum áður hevur spælt við AGF, og sum eisini hevur verið venjari í felagnum.

**Góð mál**

AGF vann 2–0 mánakvøldið. Harvið er Vejle so rudduliga í botninum, meðan AGF – fyribils í hvussu so er – er komið upp um niðurflytingarstrikuna.

Dysturin var vánaligur, men heimamenninir tóktust ávirkaðir av venjaraskiftinum á tann hátt, at teir løgdu nógv fyri. Fyrra málið kom, tá hálvur tími var farin. Mads Jørgensen royndi seg úr 24 metrum, og bólturin dúkkaði undir tvørtrænum.

Sigurin varð staðfestur, tá seinna umfarið bara var ein góðan minutt gamalt. Nocko Jokovic skoraði, eftir at íslendingurin Tómas Ingi Tómasson hevði lagt innfyri úr vinstru. Málið líktist ikki so lítið tí næsta, sum B68 fekk á Svangaskarði sunnudagin. Ta ferðina stóðu teir í B36 verjuni og bíðaðu eftir, at dómarin skuldi bríksla fyri rangstøðu. Mánakvøldið bíðaðu teir í verjuni hjá Vejle eftir sama dómi, men dómarin tagdi.

# Rigmor setti nýtt met

*Rigmor N. Joensen og Guttorm Sørensen vunnu kappingarnar í hálvum maraton*

Rigmor N. Joensen hevði bara seg sjálva at kappast ímóti, og tað kappingina vann hon.

Tá hálvt maraton var á skránni leygardagin, setti hon nýtt met, tá hon rann teinin í tíðini 1,27,36. Hetta var fimtbesta tíðin í kappingini yvirhøvur. Rigmor var einsamøll kvinna í kappingini.

11 mans runni teir 21,1 kilometrarnar, sum er frá vegnum omanfyri Funningsfjørð og á bryggjuna á Toftum.

Fyrstu fimm kilometrarnar fylgdust fýra rennarar í oddanum. Tað vóru Cecil Weihe, Guttorm Sørensen, Sølvi R. Hansen og Gunnar Dahl-Olsen. Síðan dragnaði Gunnar, og tá rennararnir vóru komnir um teir 10 kilometraranar dróg Guttorm frá hinum.

Guttorm helt leiðsluna allan vegin á mál, og Cecil tryggjaði sær næstfremsta plássið.

Vinnaratíðin hjá Guttormi Sørensen, sum rennur fyri Treysti, var 1,22,09, og tað er seks sekund skjótari enn vinnaratíðin í fjør.

Líkindin vóru góð at renna leygardagin. Tað var turt, eini 10 hitastig, og undanvindur var stóran part av teininum.

**ek**